# Hondbóltur, endaliga støðan

**1. Deild kvinnur**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 12 | 11 | - | 0 | - | 1 | 694 | 440 | 254 | 34 |
| 2 | Stjørnan | 12 | 7 | - | 1 | - | 4 | 585 | 495 | 90 | 24 |
| 3 | Neistin | 12 | 7 | - | 1 | - | 4 | 544 | 471 | 73 | 23 |
| 4 | VB | 12 | 7 | - | 1 | - | 4 | 559 | 571 | -12 | 21 |
| 5 | StÍF | 12 | 5 | - | 0 | - | 7 | 468 | 558 | -90 | 11 |
| 6 | Kyndil | 12 | 2 | - | 1 | - | 9 | 540 | 630 | -90 | 8 |
| 7 | Sóljan | 12 | 1 | - | 0 | - | 11 | 444 | 669 | -225 | 5 |

**1. Deild menn**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 12 | 10 | - | 0 | - | 2 | 722 | 609 | 113 | 31 |
| 2 | Neistin | 12 | 9 | - | 0 | - | 3 | 750 | 637 | 113 | 28 |
| 3 | StÍF | 12 | 10 | - | 0 | - | 2 | 678 | 636 | 42 | 26 |
| 4 | Kyndil | 12 | 5 | - | 1 | - | 6 | 566 | 639 | -73 | 13 |
| 5 | Tjaldur | 12 | 4 | - | 0 | - | 8 | 632 | 691 | -59 | 12 |
| 6 | H71 | 12 | 0 | - | 3 | - | 9 | 670 | 741 | -71 | 9 |
| 7 | KÍF | 12 | 1 | - | 2 | - | 9 | 632 | 697 | -65 | 8 |

# Onnur mugu sleppa framat

**Fráfarandi formaður: Niclas Joensen takkar á aðalfundinum hjá FBF fyri seg sum formaður. Hann hevur havt ovastu leiðsluna av føroyska flogbóltinum um hendi í tólv ár, og nú heldur hann at onnur eiga at sleppa framat.**

FLOGBÓLTUR
*Sveinur Tróndarson*

Tá leygardagurin 20. apríl er farin afturum, er eitt tíðarskeið í føroyskum flogbólti komið at enda. Orsøkin er, at formaðurin, Niclas Joensen, hevur valt at takka fyri seg, og sjálvt um onkur skemtingarsamur hevur hug at siga, at tað hevur hann gjørt fyrr, staðfestir Niclas, at hesuferð verður tað.

- Eg havi sitið sum formaður í FBF í tólv ár íalt, og tað haldi eg er nógv mikið. Nú er rætt at loyva øðrum framat, eisini fyri at onnur kunnu sleppa at gera broytingar, sigur Niclas í eini stuttari viðmerking.

## Flogbólturin í fyrstu røð

Tað er eingin loyna, at Niclas altíð hevur havt eitt gott eyga til flogbóltin og umsitinga av hesi ítróttargrein. Hann gjørdist stjórnarlimur í FBF í 1984 og longu árið eftir varð hann valdur formaður. Hann varð sitandi til 1990 tá hann legði frá sær fyri fyrstu ferð, men longu seks ár seinni var hann aftur at síggja.

Tá varð hann aftur valdur inn í stjórnina og enn einaferð gekk bara eitt ár til hann aftur tók við formansstarvinum. Nú - seks ár seinni - takkar hann aftur fyri seg, og so mugu vit bara bíða fyri at síggja, um hann tekur við aftur nevndarsessinum í 2008, tá seks ár aftur eru liðin ...

Umframt at hava verið nevndarlimur, hevur Niclas eisini verið landsliðsvenjari í nógv harrans ár. Hann vandi menninar til Oyggjaleikirnar á Guernsey í 1987 og til smálandakappingina í San Marino um sama mundið, men tók so við sum venjari hjá kvinnunum stutt eftir.

Og tað er sum kvinnulandsliðsvenjari vit kenna hann best, og tað er eisini har hann hevur fingið bestu úrslitini. Seinastu tveir Oyggjaleikirnar hevur hann, saman við hjálparvenjarum og leikarum fingið tingini at hingið soleiðis saman, at gullið hevur havt bústað í Føroyum. Men sum vit hava skilt heldur hann fram í hesum starvinum.

## Undirtøkan betri

Spurdur um, hvat hann heldur vera størstu framgongdina fyri føroyskan flogbólt, hesi tíðarskeiðini hann hevur sitið sum flogbóltsforseti, sigur Niclas, at undirtøkan hjá flogbóltinum er batnað nógv.

Áskoðararnir hava fingið eyguni upp fyri ítróttargreinini, sum annars hevur gingið undir at vera lítið áhugaverd fyri áskoðararnar. Síðani kreppuna eru alsamt fleiri farin at leika flogbólt, og bara tey seinnu árini, síðani farið varð undir steypakappingarnar er undirtøkan frá áskoðarunum økt sera nógv.

- Vit skipaðu fyri FM fyri tey yngru um vikuskiftið og tá vóru umleið 100 lið við, og tað merkir, at undirtøkan fyri flogbóltinum aftur er vorðin stak góð, sigur fráfarandi formaðurin.

Innanveggja - í FBF - heldur Niclas størstu hendingina vera veddingarpengarnir, sum komu fyri nøkrum árum síðani, tí hesir góvu eitt nú FBF møguleikan at økja um virksemi.

- Men peningurin setir samstundis FBF fleiri krøv, tí skalt tú fáa tað sama burtur úr hesum peninginum er neyðugt, at fáa fleiri fólk upp í arbeiði við flogbóltinum. Sjálvt um vit fáa meira pening, fáa vit ikki bygt eina størri organisatión og tí er neyðugt at fleiri taka eina hond í, sigur Niclas.

Annars heldur hann tað hava havt stóran týdning fyri menningina av føroyskum flogbólti, at FBF hevur arbeitt miðvíst fyri at tryggja fíggjarliga grundarlagið hjá sambandinum.

Sjálvt um FBF er eitt tað yngsta sersambandið í landinum er peningur á kistubotninum og tað ger, at tað ber til at arbeiða uttan alla tíðina at hyggja í kassan.

- Vit hava eina eginogn upp á út við 400 túsund krónur og hon er neyðug um vit skulu kunna arbeiða, sigur Niclas.

Sum vera man er Niclas ikki nøgdur við alt, og størsta trupulleikan heldur Niclas vera dómaraspurningin, sum ikki er loystur.

- Hetta saman við yngru landsliðunum er - eftir míni meting - nakað sum nýggja nevndin má loysa sum skjótast, sigur Niclas Joensen, fráfarandi formaður í FBF at enda.

























































